VIÐMERKINGAR

# Klassiskar konsertir

**Øssur Bæk og Jóhannus Andreasen fara hesa vikuna at hava tvær konsertir**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



*Øssur Bøk og Jóhannuse Andreasen verða báðir roknaðir millum fremstu tónleikararnar her á landi*

Øssur Bæk og Jóhannes Andreasen eru millum fremstu tónleikarar okkara. Báðir hava teir, ávikavíst sum violin- og klaverleikari, bergtikið okkum sum solistar við m.a. Symfoniorkestrinum og í úrmælingabólkinum Aldubáruni.
Báðir eru teir royndir tónleikarar við altjóða útbúgvingum og royndum.
Øssur traðkaði sínar barnaskógvar sum Suzukinæmingur í Keypmannahavn, meðan Jóhannes byrjaði klaverspæl sítt hjá megnar kvinnuni Rigmor Restorff, sálu. Síðani førdi evni teirra til framhaldandi tónleikalestur kring Evropu.

Øssur Bæk byrjaði á tónlistarskúanum í Odense og fór so víðari til navnframa Liebermann í Utrecht, har ið hann tók endaligt prógv. Jóhannes Andreasen læs í Wien og hevur hann m.a. nomið sær framhaldandi kunnleika hjá Feuchtwanger í London.
Hóast hesir báðir hava verið víða um við list síni, so eru teir trúgvir móti føroyskum tónelikaumhvørvinum. Báðir vóru við til at stovna yrkistón-listabólkin Aldubáruna og hava teir eisini fyrr spælt saman í Konsertfelagsins høpi.
Hesaferð er tað m.a. stórverkið "Kreutzersonatan" hjá Beethoven, ið er á skránni. Fyrra konsertin verður í Mentunarhúsinum í Fuglafirði hóskvøldið, og seinna konsertin verður í Læraraskúlahøllini leygardagin. Atgongumerki til konsertingar fáast hjá kunningarstovunum kring landið.

# Ferðavinnumiðstøðin í Vestmanna reist

**Húsið, sum hevur matstovu, kunningarstovu, gávubúð og møguleikar at halda ráðstevnur, letur upp í summar**

FERÐAVINNA
*tíðindaskriv*

Í farnu viku varð húsið sum Partafelagið Vestmanna Ferðavinnufelag (Vestmanna Tourist Centre) byggir í Vestmanna, reist. Húsini standa við bátahylin Inni á Fjørð, júst har sum bátarnir sum sigla útferðir undir Vestmannabjørgini hava sínar fráferðir. Húsini eru stór, umleið 300 fermetrar tilsamans í tveimum hæddum, og í matstovuni í neðra er pláss fyri umleið 70 fólkum.
Ein spurnarkanning sum fyrireikararnir gjørdu millum ferðafólkini síðsta summar vísti, at stórur áhugi er fyri húsinum. Ætlanin er at hava nógvan føroyskan mat í matstovuni so sum fisk og grind, sum ferðafólk fegin vilja royna. Men annar matur verður eisini at fáa. Í gávubúðini verða ymisk tinganeyst at fáa. Ætlanin er, at Vestmanna Tourist Centre skal lata upp 1.mai í ár.



*Eftir ætlan skal nýggja ferðavinnumiðstøðin lata upp 1. mai*

# Arbeiðs- & búskaparstøðan í Føroyum!

**Hans Birgir Hansen**
*H.A.F. limur í Havn*



Tað er avgerandi neyðugt at fáa framt dagføringar av teim galdandi donsku lóggávum/skipanum við kongaligari fyriskipan og anordning eins og tær útlendsku í dag! Tað er avgerandi neyðugt at fáa framt eina búskaparliga, samfelags, handils, vinnuliga og útbúgvingarliga javnvág og hvat ið arbeiðsvikutímatali viðvíkur! Tað er avgerandi neyðugt at fáa fyribeint forðingar, ið arbeiðsleysu/tøku hava at dragast við undir Als- og Almannastovuskipanum, so øll sleppa aftur til arbeiðis!

Tað er eingin, ið doyr av at arbeiða/starva og vinna til lílvsins uppihald, ístaðin fyri at vera undir nevndu skipanum, ið skapa arbeiðsleysu/tøku kreppur/trupulleikar!
Tað er einki framt av politiskum tiltøkum fyri at skapa javnvágina og millum heimini og arbeiðsplássini, so vit fáa skapt tilverugrundarlig lønmóttakarar í Føroyum!
Tað er tá slíkt er framt, vit skapa familjur og einstøku fíggjarliga grundarlagið og sosiala trygdarnetið og vælferðina skapa lønmóttakarar sjálvir í øllum Føroyum! Tað er funnist harðliga at fakfelags forkvinnum/monnum/limum, ið ikki sýna nakran samhuga, solidaritet við teim arbeiðsleysu/tøku limum í øllum Føroyum! Tað hevði einki arbeiðsloysi verið í øllum Føroyum, fingu vit greitt fakfelags ruðuleikar og steðgað teim, ið eru farin tvørtur um øll fakmørk tíma/mánaðarløntu! Hetta er í stríð við fakfelagslógir/viðtøkur hjá fakfeløgum tá óskipaðu/skipaðu í fakfeløgum bera seg soleiðis at ið skuldu verði rend úr fakfeløgunum í dag! Eg síggi fleiri sjálvstøðugt vinnurekandi fólk taka í dag arbeiðir/størv frá arbeiðsleysu/tøku saman við bíligu føroysku/útlendsku arbeiðsmegi í Føroyum! Eg komi at fylgja slíkum og øðrum sjónarmiðum upp í lesarabrøvum og kjaktorgunum á interneti og úti í millum manna, tá kjakið skal vera seriøst skipað í dag!

# Loftferðsla uttan kapping

**Firouz Gaini**



Í tí føroyska vinnulívinum hava vit, sum blaðstjórin í Vinnutíðindum eisini hevur sagt, tvíbýtt monopol í nógvum vinnugreinum, t.v.s. at einans tveir stórir aktørar eru á marknaðinum; til dømis innan telesamskifti, bankavirksemi, trygging og ølbrygging. Sama var galdandi í loftferðsluni, líka til Maersk gavst at flúgva til Føroyar í 2004. Best hevði verið at havt nógvar aktørar á marknaðinum, tvíbýtt monopol er til at liva við, men rein monopolstøða er ikki ynskilig.
Flestøll fegnast sjálvandi um framgongdina hjá Atlantic Airways, at felagið veksur og opnar nýggjar flogrutur, men tað er púra burturvið, at ein (apex) ferðaseðil til Keypmannahavnar skal kosta umleið 3.400 krónur í 2005. Felagið hevur skund, nú skulu ferðafólkini fíggja stórar verkætlanir, og kappingarneytar haldast langt vekk. Prísirnir eru farnir upp, hóast sagt varð, at teir helst fóru niður. Ein (retur) ferðaseðil úr London til Kina kostar tað sama sum ein Føroyar-Danmark-ferðaseðil hjá Atlantic Airways! Og fyri somu upphædd kann ein fara einar 3-5 ferðir úr Keypmannahavn til London. Vónandi kemur okkurt íslendskt, danskt, norskt, ella annað flogfelag, at kappast við Atlantic á Føroyarutuni, tí tað eru vanligu ferðafólkini (tey, ið betala úr egnum lumma), sum eru taparanir sum støðan er nú.
Príspolitikkurin hjá Atlantic er eisini alt annað enn rættvísur. Hvør er komin við tí tápuliga hugskotinum, at tvey fólk skulu noyðast at ferðast saman fyri at fáa lækkaðar ferðaprísir? Og hvussu ætlar Atlantic at verja, at tilboðini hjá teimum mangan bara eru galdandi fyri ferðir *annan* vegin, til dømis til Danmarkar á jólum (og ikki til Føroyar)? Eg skilji væl, at felagið ynskir at fylla flogførini, men er hetta ikki samstundis at halda ferðafólkini fyri gjøldur? Er tað yvirhøvur lógligt?
Vit kunnu bara sita og vóna at í minsta lagi eitt av hesum fer at henda skjótt: At Atlantic viðgongur, at umleið 3.400 og 2.600 krónur fyri ávikavist apex- og vikuskiftisferðir til Danmarkar, er alt ov dýrt. At annað felag tekur kappingina upp við Atlantic. At ferðafólk fáa almennan studning til at sleppa av landinum. Í eini framkomnari tjóð eigur at vera lætt at sleppa til og úr landinum. Og tað er ikki galdandi fyri Føroyar anno 2005.